# Grør um gangandi fót

**- Tað grør um gangandi fót. Tað eru nógv positiv tekin, sum siga okkum, at vit nú eru ávegis uppaftur aftaná á trý tey seinastu laku árini sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, nú árið er farið at halla og vit stevna móti 2006**

FARANDI OG KOMANDI ÁRIÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður sær bjart uppá framtíðina*

Hann vísir á, at alingin er um at fóta sær aftur. Tøkan við endan av 2006 verður millum 15.000 og 20.000 tons. Við endanum av 2007 kanska 30.000 tons og væntandi meira árið aftaná.

Landsstýrismaðurin sær fyri sær bjartari tíðir á nógvum økjum. Tað eru greið tekin um, at fiskiskapurin er á veg uppeftir samstundis sum at alivinnan er við at fóta sær, og at príslegan alsamt hækkar. Oljuprísirnir eru stagnerandi og fara helst at lækka nakað. Kappingin millum peningarstovnarnar harðnar. Hetta ger, at brúkarin fær fleiri midlar at ráða yvir, og at peningarenslið samfelagnum fær eina saltvatnsinnsprænging.

### Minkandi arbeiðsloysi

Bjarni Djurholm vísir eisini á aðra hepna gongd í samfelagnum, nevniliga støðuna á arbeiðsmarknaðinum. - Arbeiðsloysið hevur verið minkandi seinnu helvt í ár, inntøkunar hjá landskassanum eru nú á veg uppeftir. Hóast niðurgongd í fiskiskapinum, so eru sum nevnt fleiri hendur komnar í arbeiði. Tað kemst av, at samfelagsbúskapurin ikki er so einstáttaður, sum mangan sagt.

Omanvert 90% av okkara vøruútflutningi stavar framvegis frá vørum, men vit eiga at leggja okkum í geyma, at vøruútflutningurin neyvan gevur samfelagnum meira enn gott 60% av samlaðu inntøkunum. Tvs. at út við 40% stava frá øðrum. Vit vita, at danski statstuðulin gevur samfelagnum eini 16%. Hini 24 - 25% stava frá tænastum av ymiskum slag, og hetta er í vøkstri. Vísandi til minkingina í arbeiðsloysinum farna árið, eru ábendingar um, at okkara búskapur er minni heftur av høvuðsvinnuni í mun til áður, og er tað sera positivt. Hetta hava vit væntað í Vinnumálaráðnum farnu árini. Nú sær tað so út til, at gongdin er handa vegin sigur landsstýrismaðurin og heldur fram:

- Vísandi til væntaða vøksturin í alivinnuni, kappingina millum bankarnar, øktan fiskiskap, betraðar prísir, eina alsamt meira diverfiseraða heimavinnu og ikki at gloyma væntandi positivu úrslitini fyri komandi oljuvinnu, so síggi eg ljóst uppá framtíðina.

Hann sigur víðari, at landsstýrið arbeiðir miðvíst við eini tryggari einskiljingartilgongd, sum fer at orsaka, at tað almenna verður skuldarfrítt um fá ár, og at almennu Føroyar av somu orsøk fara at megna at stuðla framtíðar gransking, styrkja undirvísingarverkið og ikki minst fara at menna og útbyggja almannatænastur á eldraøkinum, so tað verður gott at vera gamal í Føroyum. Tí sær hann ljóst uppá framtíðina.

- Førdi politikkurin fer at bera góða frukt. Viðvíkjandi oljuleitingunum næsta ár, vænti eg, at vit fara at vera positivt yvirraskað. Tað eri eg meira sannførdur um nú enn áður.

### Broytingar

Bjarni Djurholm sigur víðari, at henda samgongan/landsstýrið hevði eina álvarsliga uppgávu fyri stavn um ársskiftið 2003/04, tá tað kom undan kavi, at fíggjarlógin, sum tá lá í løgtinginum við einum yvirskoti upp á 100 mio kr, vísti seg at enda við reellum halli uppá 200 mio kr. Tvs. ein munur uppá 300 mio kr skeiva vegin. Hetta var so útgangsstøðið fyri hesa samgonguna.

- Vit hava tí roynt av øllum alvi at fáa útreiðslurnar at javnviga við inntøkurnar uttan at bremsað verður so harðliga, at samfelagið støðgar. M.a. hevur landsstýrið lagt alla orku í at gera broytingar í skattaskipanini so løntakarar ikki kenna byrðuna ov stóra og at vit kunnu halda fast við eitt peningarensl í samfelagnum, sum kann tryggja, at so nógvar hendur eru í arbeiði sum gjørligt.

Alternativið kundi verið, at fólk rýmdu av landinum til stóran skaða fyri samfelagið alt. Prísurin hevur verið, at vit í fyrstu atløgu hava havt minkandi inntøkur til landskassan, men vit hava verið sannførd um, at landið fór at vinna henda missin aftur upp á sikt, og fer tað óivað at vísa seg næsta ár. Tí er tað mín niðurstøða, at politikkurin hjá landsstýrinum/samgonguni nú fer at bera frukt. At tað fer at grøða um gangandi fót.

# Dupultsangur og jólahugni

Tollaksmessudag er vanligt at jólahugni verður fyriskipaður fyri teir, sum vanliga hittast í Undirhúsinum í Havn.

Soleiðis varð eisini gjørt í ár, og "traditionen tro" so fingu teir um 40 menninir vitjan av Dupultkvartettini í Ebenezer aftur í ár. Hesa løtuna sungu teir einar 7 sangir, sum hugtóku hesar menninar.

Afturvið góðum sangi hugnaðu teir allir sær við kaffi, køkum og tí, sum hoyrir einum slíkum jólahugna til.

**sb.**





*Dupultkvartettin setti sín serstaka dám á hugnaløtuna í Undirhúsinum*

*Teir duga at hugna sær, hesir menninir sum so trúfast ganga í Undirhúsið*

*Mynd: Jan Müller*